GJALDSTOVAN

Rokskapargóðkenningarskipanin (RGS) er tøk á heimasíðuni hjá Gjaldstovuni.




1) Fyrst verður roknskapurin útlisin úr bókhaldsskipanini og goymdur í einari mappu, haðani til ber at lesa hann inn í RGS.

2) Trýst á **pílin** beint við **Send nýggja fílu**.




3) Trýst á **Vælg fil** fyri at finna og velja roknskapin.




4) Vanliga stendur røtt kommuna í teiginum **Skjalaslag**.
5) Trýst síðan á **Send**, fyri at innlesa í RGS.



Tá roknskapurin er sendur, sær myndin soleiðis út:




6) Trýst á **Góðkenn**, so verður fílan kannað.
7) Um okkurt er í roknskapinum, sum RGS vil siga frá, kemur ein lítil rútur upp og sigur, at feilur er í roknskapinum. Trýst á OK.
8) Um RGS ikki finnur nakran feil við fíluni, fær fílan støðuna **Góðkend av sendara**. Um trýst verður á **Góðkenn** einaferð afturat, og RGS framvegis ikki finnur nakran feil, fær fílan støðuna **Góðkend av móttakara** og verður flutt frá **Skjøl at góðkenna** til **Avgreidd skjøl**. Um RGS sigur, at onkur feilur er í fíluni, er neyðugt at kanna tað, sum kemur fram í tesetúrslitinum.
9) Fyri at síggja testúrslitið, verður trýst á fílunavnið í teiginum uttast til vinstru.

Vindeygað, har feilfráboðanirnar eru, sær út, sum myndin niðanfyri. Her sæst, at RGS heldur feil vera í onkrum bókingarlinjum og avstemmingum.

Á hesi myndini sæst, at feilur er á standardroknskaparkontuni (StRk). Á bókingarlinjuni síggja vit, at talan er um StRk 0360.

10) Fyri at síggja feilirnar í bókingarlinjunum, verður trýst á Feilur, í teiginum uttast til vinstru.
11) Fyri at síggja feilfráboðanirnar viðvíkjandi avstemmingum og øðrum, verður trýst á Feilur út fyri Góðkenning úti til vinstru.



12) Er feilur við undirkontuni, ber til at fáa RGS at vísa ein teig við øllum undirkontunum. Tað verður gjørt við at trýsta á **View** / **Columns** / Ma**nage Columns** / **UK** og **>**

Síðani ber til at velja, hvar UK teigurin skal vera í listanum við at trýsta á pílarnar upp og niður.






Á hesi myndini sæst, at RGS heldur, at ójavni er á rørsluni á 7130/7630 tilsamans og ávísar bókingar á kommunuavrokningini. Fráboðanin sigur, hvat stendur í roknskapinum, og hvat RGS finnur á kommunuavrokningini (KAD).



**Validering**

View ▾ | Detach

| Úrslit | Regla | Koyring | Lýsing |
|---|---|---|---|
| ERROR | 50: Avstemma avrokningarslag 1 | 12/3/2015 | Rørsla á 7630 og 7130 er: -150.825,00. Rørsla í KAD fyri hesa kontu er: -154.993,00 |
| OK | 19: Rentuinntøka skeivt bókað | 12/3/2015 | |
| OK | 20: Persónsskattur bókaður skeivt | 12/3/2015 | |
| OK | 21: Felagsskattur bókaður skeivt | 12/3/2015 | |
| OK | 22: FAS-stuðul | 12/3/2015 | |
| OK | 23: Grein 25 | 12/3/2015 | |
| OK | 25: Kanna um løga er bókað á RKST og AN | 12/3/2015 | |
| OK | 26: Ognir og avskrivingar eru ikki í lagi | 12/3/2015 | |
| OK | 30: Avstemma 0330 í roknskapi við 0330 í I | 12/3/2015 | |
| OK | 31: Avstemma 0331 í roknskapi við 0331 í I | 12/3/2015 | |
| OK | 47: Avstemma 0841 við 0365 | 12/3/2015 | |
| OK | 48: Avstemma 0842 við 0366 | 12/3/2015 | |
| OK | 49: Avstemma 0843 við 0367 | 12/3/2015 | |
| OK | 32: Musikkskúlar | 12/3/2015 | |
| OK | 33: Frítíðarundirvísing | 12/3/2015 | |
| OK | 34: Endurgjald lærlingar | 12/3/2015 | |
| OK | 35: MVG-endurgjald | 12/3/2015 | |
| OK | 36: Forskatting av pensiónum | 12/3/2015 | |

Hetta eru so feilfráboðanir, sum man má taka støðu til, áðrenn roknskapurin kann sleppa ígjøgnum.

Meginreglan, miðað verður eftir, er, at øll hesi viðurskifti skulu vera í lagi, áðrenn roknskapurin verður innlisin.

Men tað eru støður, har undantøk mugu gerast, t.d. um talan er um rættingar á haldgóðum grundarlagi. Annað dømið er, um móttakarin av einum kravið í KMR drálar við at leysgeva. Hesi undantøk fáast frá Gjaldstovuni.

Hvørja ferð man trýstir á **Góðkenn** knappin, ger RGS eina kanning av roknskapinum. Er eingin feilur í roknskapinum, kann man trýsta á **Góðkenn** knappin einaferð afturat. Tá verður roknskapurin sendur til bókhaldsskipanina hjá Gjaldstovuni. Innlesingin í bókhaldsskipanina fer fram sjálvvirkandi. Í løtuni verður roknskapurin posteraður manuelt. Tað er væl møguligt, at hann kann posterast sjálvvirkandi í framtíðini.




Ein fíla í RGS, sum ikki skal brúkast meir, kann strikast við at trýsta á **Strika**. Minst til at standa á røttu linju, um fleiri fílur eru í RGS.

Sum áður nevnt, verður ein innlisin fíla flutt til skiljiblaðið **Avgreidd skjøl**, sum sæst á myndini omanfyri.

Góða eydnu!